

# Roknskaparleiðari

Tórshavnar havn umsitur øll havnaløgini og bátahylarnar í kommununi. 2.300 skip leggja til bryggju árliga, harav 50 ferðafólkaskip. Tað er vakt á havnarskrivstovuni á Eystaru bryggju alt samdøgrið, har tað tilsamans arbeiða 14 fólk.

Tórshavnar havn søkir eftir roknskaparleiðara, at standa fyri dagliga bókhaldinum, sum m.a. umfatar fíggjarbókhald, skuldara- og ognarabókhald, kontering, bóking, avstemman av bókhaldi, avgreiðslu av lønum og mánaðarligar roknskapir.

Av tí at arbeiðsplássið er lutfalsliga lítið, kann roknast við øðrum smærri uppgávum.

Bókhaldsskipanin Navision verður brúkt.

Tú hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum, og hevur ein kundavinarligan framburð.

Rokna verður við, at tú hevur útbúgving og royndir, sum gera teg skikkaðan at røkja starvið.

Starvið er lønt í 6. flokki sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og KAF.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jónsvein Lamhauge, havnarmeistara, tlf. 311762.

Umsóknir til starvið, skulu verða Tórshavnar havn, Postboks 103, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 23. september 2010, kl. 10.00.

Starvið verður sett skjótast gjørligt.



LÍV søkir eftir

# avloysara til bókhaldsarbeiði

at byrja skjótast gjørligt.

**Starvsøkið**
Sum avloysari á fíggjar- og roknskapardeildini verður tú partur av bókhaldstoyminum og kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við onnur á deildini. Starvið er tíðaravmarkað til 31. mai 2011.

**Um teg**
Vit vænta, at tú hevur eitt sjálvstøðugt arbeiðslag, ert íðin, hevur góð samstarvsevni og dugir væl at samstarva og at arbeiða í bólki. Vit vænta, at tú hevur viðkomandi útbúgving ella royndir.

**Umsóknir og umsóknarfreist**
Umsóknir við avritum av prógvum, CV og øðrum skjølum kunnu sendast við teldubrævi til atli@liv.fo ella við vanligum brævi til:

LÍV
Starvsfólkadeildin
Kopargøta 1
Postsmoga 206
110 Tórshavn

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 27. september.

**Meira at vita?**
Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Eyðnu Justinussen, fíggjarleiðara, á telefon 21 95 75 ella á eydna@liv.fo.

Kopargøta 1
P.O. Box 206
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tlf. +298 31 11 11
Fax +298 35 11 10
www.liv.fo

LÍV er størsti veitari av lívs- og eftirlønartryggingum til fakfeløg og virkir.

SENDISTOVAN